# Fíggjarmálaráðið

**Lógartænastan**

Dagfesting: 3. november 2020
Mál nr.: 20/00433
Málsviðgjørt: AP
Eftirkannað: Lógartænastan dagfestir

**Uppskot til**

## Kunngerð um broyting í kunngerð um parkeringskort fyri persónar við avlamni
(Nýggjar ásetingar um stovnskort)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 2 frá 13. januar 2015 um parkeringskort fyri persónar við avlamni, sum broytt við kunngerð nr. 100 frá 10. juli 2018, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Heiti á kunngerðini verður orðað soleiðis:

“**Kunngerð um parkeringskort og stovnskort fyri persónar við avlamni**”

**2.** Yvirskriftin yvir § 1 verður orðað soleiðis:

“*Útgáva og endurnýggjan av parkeringskorti, stovnskorti o.a.*”

**3.** § 1 verður orðað soleiðis:
“**§ 1**. Eitt parkeringskort er eitt serligt kort, sum verður útgivið til persónar við avlamni, og sum lúka treytirnar í § 6. Parkeringskortið er sniðgivið í samsvari við ásetingarnar í skjali 1.
*Stk.2.* Eitt stovnskort er eitt serligt kort, sum verður útgivið til stovnar, sum lúka treytirnar í § 9 a. Stovnskortið er sniðgivið í samsvari við ásetingarnar í skjali 2.
*Stk. 3.* Parkeringskortið og stovnskortið skal góðkennast av Akstovuni.
*Stk. 4.* Parkeringskortið er skjalprógv fyri, at handhavin er fevndur av teimum undantøkum um parkering, sum eru nevnd í § 11. Parkeringskortið kemur í staðin fyri verandi avlamisskelti, sbrt. § 18.”

**4.** § 2, stk. 1 verður orðað soleiðis:
“Umsókn um útgávu ella endurnýggjan av parkeringskorti ella stovnskorti verður latin MEGD, sum avgerð um umsóknin kann verða gingin á møti ella ikki.”

**5.** Í § 2, stk. 2 verður aftan á “parkeringskorti” sett: “og stovnskorti”.

**6.** Í § 3, stk. 2, nr. 5 verður aftan á "sjónlig" sett: ",".

**7.** Í § 3 verður sum stk. 7 sett:
"*Stk. 7.* Tá ein avgerð skal takast um útgávu av stovnskorti, sbrt. § 9 a, skal umsøkjarin vátta á umsóknarblaðnum, at tað eru ein ella fleiri borgarar knýttir at stovninum, sum eru sera illa gongdir, hava varandi niðursett evni at virka ella onnur líknandi heilsulig viðurskifti, sum í stóran mun skerja evni ella ger tað trupult at ferðast, og sum lúka krøvini um útgávu av parkeringskorti."

**8.** § 4 verður orðað soleiðis:
"**§ 4.** MEGD kann í sambandi við viðgerð og avgerð av málum um útgávu av parkeringskorti ella stovnskorti, brúka KT í viðgerðini í samsvari við trygdarkrøvini til almennar skráir."

**9.** Í § 5 verður sum stk. 3 sett:
"*Stk. 3.* Stovnskort verður útgivið ella endurnýggjað við gildi í 5 ár."

**10.** Yvirskriftin yvir § 6 verður orðað soleiðis:

"*Treytir fyri útgávu og endurnýggjan av parkeringskorti o.a.*"

**11.** Aftan á § 9 verður sett:

"*Treytir fyri útgávu og endurnýggjan av stovnskorti o.a.*

**§ 9 a.** Stovnskort verður útgivið og endurnýggjað til eitt akfar, sum er knýtt at:
1) røktarheimi, sbrt. § 13, stk. 2, nr. 1 í løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt m.v.,
2) eldrasambýli, sbrt. § 13, stk. 2, nr. 2 í løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt m.v.,
3) fyribils bústaði, sbrt. § 45 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur,
4) vardum bústaði, sbrt. § 46 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur, ella
5) serligum bútilboði, sbrt. § 47 løgtingslóg um almannatrygd og tænastur.

*Stk. 2.* Útgáva av stovnskorti er treytað av, at tað á stovninum, sbrt. stk. 1, býr ein ella fleiri borgarar, sum eru sera illa gongdir, hava varandi niðursett evni at virka ella onnur líknandi heilsulig viðurskifti, sum í stóran mun skerja evni ella ger tað trupult at ferðast.

**§ 9 b.** Eitt stovnskort kann bara brúkast í Føroyum, og bara í sambandi við flutning av borgarum knýttir at stovnum, sum eru nevndir í § 9 a, stk. 1, nr. 1-5, og sum hava ein tørv, sum ger, at teir hava brúk fyri einum stovnskorti, sbrt. § 9 a, stk. 2.
*Stk. 2.* Eitt stovnskort má bert nýtast í tí akfari, sum loyvið er givið til."

**§ 9 c.** Broytingar í upplýsingunum hjá umsøkjaranum skulu fráboðast MEGD.
*Stk. 2.* Um so er, at stovnurin, sbrt. § 9 a, stk. 1, ikki longur lýkur treytirnar fyri at hava stovnskort, skal kortið latast aftur til MEGD."

**12.** Í § 10 verður aftan á "parkeringskort" sett: "ella stovnskort".

**13.** Í § 11, stk. 1 verður aftan á "parkeringskorti" sett: "ella stovnskorti"

**14.** Í § 11, stk. 2 verður "v.m." broytt til: "o.a."

**15.** Í § 11, stk. 2 verður aftan á "parkeringskorti" sett: ella "stovnskorti".

**16.** Yvirskriftin yvir § 16 verður orðað soleiðis:

“*Gjald fyri útgávu og endurnýggjan av parkeringskorti ella stovnskorti*”

**17.** Í § 16 verður sum stk. 4-6 sett:
“*Stk. 4*. Fyri útgávu av stovnskorti verður goldið 425 kr.
*Stk. 5*. Fyri endurnýggjan av stovnskorti verður goldið 425 kr.
*Stk. 6*. Fyri útgávu í sambandi við burturmist stovnskort, ella um handhavin av aðrari orsøk biður um nýtt stovnskort, verður goldið 425 kr.”

**18.** Í § 17 verður aftaná “parkeringskorti” sett: “ella stovnskorti”.

**19.** Skjal 1 verður sett sum skjal 2 í kunngerð nr. 2 frá 13. januar 2015 um parkeringskort fyri persónar við avlamni.

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* Tó kemur § 9 a, stk. 1, nr. 3-5, sum ásett í § 1, nr. 11, í gildi 1. januar 2021.

Fíggjarmálaráðið, 3. november 2020

**Jørgen Niclasen**
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

**Skjal 1**

## Ásetingar um útsjónd og innihald av stovnskorti

1. *Snið*
    - Stovnskortið verður útgivið í ES-sniði
    - Stovnskortið skal vera 106 mm langt og 148 mm breitt.
    - Stovnskortið skal hava appilsingula bakgrund. Tó skal teigurin undir altjóða tekninum fyri koyristól hava myrkabláa bakgrund.
    - Omaná bæði framsíðu og baksíðu á stovnskortinum, verður lagdur ein trygdarfilmur.
    - Stovnskortið hevur eina framsíðu og eina baksíðu, sum báðar eru býttar sundur í tveir loddrættar hálvpartar.

2. *Innihald*

2.1. Vinstra helvt á framsíðuni:

2.1.1. Altjóða teknið fyri koyristól í hvítum liti á myrkabláari bakgrund.

2.1.2. Navn, adressa, búmerki og hologram á útgevandi felagsskapi.

2.2. Høgra helvt á framsíðuni:

2.2.1. Ovast verður skrivað á føroyskum við stórum bókstavum: “Stovnskort fyri persónar við avlamni”.

2.2.2. Nummarplátan á akfarinum.

2.2.3. Galdandi til og frá.

2.2.4. Navn og adressa hjá stovninum.

2.2.5. Raðnummar.

2.3. Baksíðan:

2.3.1. Vegleiðing um brúk av stovnskortinum, umframt ein stutt lýsing av, hvør revsingin kann verða, um kortið verður misbrúkt.